Fa. Billutir:

# Kanna promilluna áðrenn tú koyrir


Við at blása í alkotestaran ber til at vera vísur í um tað er trygt at koyra bilin

**Ein alkotestari á stødd við eina fartelefon er sera hentur av hava hjá sær, um ein ynskjur at vera vísur í, um tað er forsvarligt at koyra bil eftir eitt jólaborðhald e.l.**

ALKOTEST

*Myndir: Álvur Haraldsen*

Vit hoyra javnan um at politiið t.d. í vikuskiftinum tekur ávirkaðar bilførarar, sum koma at missa koyrikortið í longri tíð. Hetta burdi verið ein óneyðug støða, sum kemur sera illa við hjá mongum bilførarum.

Við einum alkotestara uppi á sær kann tann sum hevur bilin við til t.d. jólaborðhaldið kanna um tað er trygt at koyra bilin heim.

Petur Martin Johansen frá Billutum sigur, at ein slíkur alkotestari, sum ikki er størri enn ein telefon, kostar kr. 595,-. Tað er ikki nógv, í mun til tað at missa koyrikortið og ikki kunna koyra bil í longri tíð og skula upp til nýggja koyriroynd.




# London Taxi til Kina



**Frá 2008 fáa hýruvognseigarar í Kina og øðrum asiatiskum londum møguleika at ogna sær tað best kenda taxa-symbolið í heiminum: Ein svartan London Taxi**

BILAR

Kinesararnir eru rættuliga farnir at gera vart við seg í bretska bilídnaðinum. Nú hevur størsti bilframleiðarin í Kina "Geely Automobile Holdings Ltd." keypt 23 prosent av partabrøvunum í bretska felagnum "Manganese Bronze Holdings Plc", sum eigur LTI Vehicles, sum framleiða tann væl kenda London taxi, sum er eitt av symbolunum hjá bretska høvuðsstaðnum.

Partabrævakeypið í "Manganese Bronze Holdings" er ein liður í eini joint-venture avtalu til 53 milliónir pund, som eisini hevur við sær bygging av eini samliverksmiðju í Shanghai, sum frá á vári 2008 skal kunna framleiða umleið 10.000 London Taxi av TX4 modellinum. Hetta er fýra ferðir so nógv sum LTI Vehicles Carbodies-fabrik í Coventry framleiðir.

LTI, sum stendur fyri "London Taxi International", byrjaðu sína tilveru í 1919 sum karrosserí-verksmiðjan Carbodies Ltd. í Coventry.

Fyrstu svørtu London Taxi komu á marknaðin í 1945. Í 1948 fóru Carbodies í samstarv við Austin-bilverksmiðjuna. 10 ár seinni kom fyrsti London Taxi FX4 við dieselmotori.

Í 1968 fekk London Taxi ta útsjóndina, sum fyri tey flestu er ímyndin av tí klassiska og rúmliga hýruvogninum.

Tað var fyrst eftir at TX1-modellið kom á marknaðin í 1997, at London taxi heilt skifti útsjónd uttan tó at missa sambandi við tann gamla hvat designi viðvíkur.

TX1 er síðan vorðin til dagsins modell TX4 við 2,5 litur dieselmotori.

Gjøgnum árini hava aðrir bilframleiðarar roynt at tikið kappingina upp við góða gamla kenda London Taxi, uttan at tað hevur eydnast.

# Alkahol- og ferðsluskeið

**1. januar 2007 koma nýggjar ferðslureglur í gildi í Føroyum. Persónar sum hava mist koyrikortið vegna rúsdrekka- ella promillukoyring skulu til A/F-skeið (alkahol- og ferðsluskeið) og hava staðið eina eftiransandi koyriroynd**

KOYRIFRÁLÆRA

Verður koyrirætturin frádømdur einum persóni treytaleyst vegna rúsdrekka- ella promillukoyring, skal viðkomandi eftir 1. januar 2007, taka koyrifrálæruna av nýggjum, taka alkahol- og ferðsluskeið og hava staðið eina eftiransandi koyriroynd, áðrenn hann fær koyrikortið aftur.

Fyri rúsdrekkakoyring verður tann revsaður, sum koyrir tá alkoholstyrkin í blóðinum fer upp um 0,8 promillu. Fyri promillukoyring verður tann revsaður sum koyrir, tá alkoholstyrkin í blóðinum fer upp um 0,5 promillu.

Ongum er loyvt at stýra ella royna at stýra einum akfari, sum er so mikið ávirkaður av rúsdrekka, at hann ikki er førur fyri á tryggan hátt at koyra akfarið. Viðkomandi kann verða ákærdur fyri rúsdrekkakoyring.

*Kelda: www.koyrilararin.fo*

